## Føroyingauppgerð uttan føroyingar

Frem telur tríggjar føroyingar í hópinum og FC Roskilde ein, men hóast hetta var ikki ein einasti føroyingur á vøllinum, tá botndysturin varð bríkslaður í gongd í Roskilde í gjár. Tá 18 minuttir restaðu av dystinum kom Bogi Løkin á vøllin fyri Frem, men tað var so eisini einasta føroyska íkastið í dystinum, sum FC Roskilde vann. Atli Danielsen, sum bleiv skaddur seinasta dyst, var ikki komin seg enn, men kundi millum áskoðararnar gleðast um trý stig, sum lyftu hansara lið upp á eitt 11. pláss, soleiðis at tað nú eru tíggju stig millum FC Roskilde og liðið, sum liggur næst undir niðurflytingarmarkinum. Hinvegin sær tað sera trupult út hjá Frem, sum hevur 11 stig upp um markið. Seks dystir eru eftir at spæla í næstbestu donsku fótbóltsdeildini.

## Klettskarð við í málleysum javnleiki

Páll Klettskarð spældi allan dystin sum áleypari, tá leygardagin vann sær eitt stig í grannadystinum móti Brønshøj. Páll Klettskarð plagar at spæla allan dystin saman við Erlingi Jacobsen, men gøtumaðurin var ikki við í dystinum leygardagin. Sum heild kann sigast, at tað var heimaliðið Brønshøj, sum lá omaná í dystinum, men teir í Vanløse megnaðu at halda tørn og verja egið mál. Hinvegin formáddu Páll Klettskarð og hinar framrættaðu kreftirnar hjá Vanløse sær ikki so nógv, men á útivølli móti einum liði, sum spælir um uppflyting, er ein málleysur javnleikur eitt fínt úrslit hjá Vanløse, ið liggur nummar átta í triðbestu donsku deildini.

*Kaj Ennigarð er heimskendur á alnetinum:*

# Eg eri so flóvur!

**HEIMSKENDUR** **Hvørki Teitur, The Dreams, Pál Joensen, Gunnar Nielsen, sigurin á Eysturríki ella nakað annað, sum vit føroyingar vanliga reypa okkum av, er blivið víst so ofta á youtube.com sum sjónleikurin Kaj Ennigarð. – Hatta eri eg ikki errin av og tað var heldur ikki mátin, eg ynskti at blíva kendur upp á, sigur Kaj Ennigarð**



**FLÓVUR KAJ**

*Í dystinum í Gundadali sunnudagin, tætt við svimjihøllina, tordi Kaj Ennigarð tó ikki at kava aftur. ÍF'arin er nú heimskendur fyri heldur láturligu kavingini, og er hann sum vera man sera flovur av sær sjálvum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Rólant Waag Dam

Kaj Ennigarð visti tað beinanvegin. Hann hevði borið seg skeivt at, tá hann tveitti seg niður í svørðin í dystinum millum ÍF og B68 og soleiðis royndi at fáa Ahmed Keita vístan av vøllinum.

– Eg vónaði, at tað ikki fór at koma í 3-2 í sjónvarpinum. Longur hugsaði eg ikki, sigur Kaj Ennigarð, sum altso á ongan hátt hevði ímyndaði sær, at lítla episodan millum hann og ein mótstøðuleikara ein sunnudag seinnapart síðst í aprílmánaði í Fuglafirði, fór at vera víst fleiri enn 340.000 ferðir á youtube.com.

### Fólk hava loyvi at flenna

Einki annað sjónbandabrot, har ein føroyingur hevur høvuðsleiklutin, er víst so ofta á youtube.com áður. Tá telja vit allar tær stóru hendingarnar við, ítróttarlig avrik eins væl og tónlistarlig, politikkur og tíðindi av øðrum slag, einki annað videobrot er víst líka ofta sum 24 sekund langi frekvensurin úr Fuglafirði. Tað er ein veruleiki, sum Kaj Ennigarð hevur eitt sindur trupult við at skilja.

– Eg veit ikki heilt, hvussu eg havi tað við tað. Løgið er tað undir øllum umstøðum. Hatta er heldur ikki nakað, eg eri errin av og avgjørt ikki mátin, eg ynskti at blíva kendur uppá, um eg kann siga tað soleiðis, sigur Kaj Ennigarð.

Sostatt hevur hann seinastu vikuna verið noyddur at funnið seg í, at vinir og liðfelagar hava argað hann við hendingini. Kaj Ennigarð skilir eisini væl, at nógv hava hug at flenna at videobrotinum, men sjálvur harmast hann um støðuna.

– Fleiri bara flenna eftir tí, onnur rista við høvdinum og eru vónbrotin. Sjálvandi skulu tey eisini hava loyvi til tað, men tann, sum er mest skuffaður av mær, eri eg sjálvur, sigur Kaj Ennigarð.

### Misti høvdið

Á heimasíðuni youtube.com, har videobrotið við Kaj Ennigarð liggur, kjakast norðurlendingar, týskarar, spaniólar eins væl og amerikumenn um hendingina. Men høvuðspersónurin sjálvur hevur ilt við at siga júst hví, hann tveitti seg niður í vøllin.

– Ja, hví gjørdu eg tað. Eg misti høvdið eina løtu, sigur Kaj Ennigarð og nevnir nakrar støður, sum vóru beint undan og sum hann ikki var nøgdur við. Hann ynskir tó ikki at lasta nakran sum helst fyri tað, sum hann gjørdi.

– Eg fari ikki at ákæra Keita ella nakran sum helst annan. Eg kann bara taka í egnan barm, sigur Kaj Ennigarð, sum als ikki skilir sín atburð.

– Eg hyggi nógv eftir fótbólti og mær dámar ikki sjónleik á vøllinum, men kortini felli eg sjálvur í júst ta grøvina, ásannar Kaj Ennigarð.

Hetta harmar hann sjálvandi, og tí vildi Kaj Ennigarð heldur enn fegin vildi broytt tað, sum hendi.

– Men eg fái ikki tikið tað aftur. Stóð tað til mín, so var videobrotið eisini tikið av youtube og øðrum heimasíðum, men tað broytir kortini ikki upp á tað, sum eg gjørdi og tað er tað, sum eg eri flovur av. Tað liggur als ikki til mín, og tí eri eg so flovur av mær sjálvum, sigur Kaj Ennigarð.

*rolant@sosialurin.fo*




*Kaj Ennigarð sæst liggjandi á vøllinum í Fuglafirði í heimskenda YouTube klippinum, við nógvum viðmerkingum frá hyggjarum kring knøttin.*